# Frá býtisbarni til stórt hitt

**10 bólkar spæla á stóru ólavsøkukonsertini, sum er vorðin størsta einstaka konsertin í landinum. Seinastu sjey árini er konsertin farin frá at verða eitt býtisbarn til at verða eitt stórt hitt millum føroyskan ungdóm, sum leita í stórum tali til konsertina**

KONSERT
*Eyðun Klakstein*



*Rókur Jakobsen og hinir í MC Hár plaga at seta lív í áhoyrarafjøldina til ólavsøkukonsertina.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tá ið tíðindafundur var um ólavsøkukonsertina fyri góðari viku síðani, helt onkur fyri, at tað er so lítið har eftir í MC Hár, at bólkurin mátti broyta navn til MC Skall.

Tað gera Niels Uni og teir ikki, men teir verða hinvegin við á ólavsøkukonsertini við fullum útblástri.

MC Hár er ein bólkur, sum hevur verið rímiliga fastur gestur á ólavsøkukonsertini seinastu árini, og gittarspælari Jens V. Jakobsen heldur, at teir eiga ein heimavøll á ólavsøkupallinum.

– Eg haldi, at vit eru tann bólkurin, sum hóskar best til ólavsøkukonsertina. Tað eru ið øllum førum eingin annar bólkur, sum fær 3000 fólk at rópa... ja, orðið lata vit vera við at seta á prent her.

Men tað er ein sannroynd, at MC Hár við sínum lívliga rapp-rock tónleiki og stundum ónærisligu tekstum kann fáa líva í stórar áhoyrarafjøldir.

## Vent í holuni og á pallinum

MC Hár verður bara ein av bólkunum í stóru rúgvuni, tá ið ólavsøkukonsertin verður hildin í Kommunuskúlagarðinum sunnukvøldið 27. juli.

Afturvendandi konsertin verður í ár hildin fyri 18. ferð, men hon hevur ikki altíð verið so væl fyri, sum hon er nú. Fyri sjey árum síðani vóru eini 600 fólk á konsertini, men seinastu árini hevur talið verið omanfyri tey 3000. Síðani konsertin fekk innivist í Kommunuskúlagarðinum miðskeiðis í høvuðsstaðnum hevur grundarlagið undir konsertini verið tryggjað. Harafturat hava fyrireikararnir roynt at fingið væl umtóktar konsertbólkar at spæla, og tað hevur lokkað fólk.

– Ólavsøkukonsertin var í nógv ár eitt býtisbarn, men seinastu árini hava vit vent einum buldrandi undirskoti til eina javnvág, og eisini tónleikarar hava fingið gleði av hesum, tí vit hava kunnað gjørt ymisk tiltøk saman við teimum, sigur Kaj Johannesen, formaður í Føroyar Undirhaldstónleikarafelag (FUT), sum skipar fyri konsertini.

Inntøkurnar frá seinastu konsertunum eru millum annað brúktar til eina útgávu við livandi tónleiki og til Prix Føroyar, sum FUT er ein partur av.

## 20 sleppa ikki við

Bólkarnir á konsertini í ár eru Terji og Føstufressar, Frændur, Monkey Mongolia, Headache Blues Treo, Déjá Vu, Take Off, All That Rain, roWan og Troels Skovgaard.

Flestu av hesum bólkum eru kendir í Føroyum, og teir hava áður víst stórar dygdir sum konsertbólkar.

Helst ókendasta navnið er Monkey Mongolia, sum er vinnarin av PopTop kappingini, og tað er siður, at hesin bólkur sleppur at byrja ólavsøkukonsertina. Troels Skovgaard er virdur danskur gittarspælari, og hann kemur higar við sínum egna bólki at spæla.

Umframt tey 10 nøvnini, sum eru komin á plakatina, vóru tað nógv onnur, sum vildu sleppa við til stóru konsertina.

– Ólavsøkukonsertin er vorðin tann størsta konsertin í landinum, og tað er stórur áhugi millum tónleikarar fyri at sleppa at verða við. Tað standa eini 20 bólkar og banka upp á hurðina, men vit kunnu ikki taka fleiri við, sigur Kaj Johannesen, formaður í FUT.

– Vit hava valt bólkarnar eftir dygd. Bæði Prix Føroyar og G! festivalurin hava tungan og ráan tónleik, men soleiðis verður ikki á ólavsøkukonsertini. Vit vilja hava tónleikarar at spæla, sum duga at stemma síni ljóðføri, sigur Kaj Johannesen og sipar helst til, at talan skal vera um góðan og væl spældan tónleik, sum tey flestu kunnu taka til sín.

## Líkist sær sjálvari

Ólavsøkukonsertin hevur seinastu árini líkst sær sjálvari, og tað kann bæði metast sum ein stór styrki og ein trupulleiki.

Orsøkin til, at konsertin er livnað uppaftur er helst, at Kommunuskúlagarðurin er vorðin karmur, og at nógvir av best umtóktu føroysku bólkunum hava spælt á konsertini.

Fólk vita, at tey fáa góðan tónleik frá ymsum bólkum, og tí leita tey aftur til hesa stóru konsertin. Hinvegin er tað ikki so nýskapandi við hesi endurtøku, men verður hugt uttanlands eftir líknandi konsertum, so sæst, at talan er um líknandi konsept.

FUT hevur fleiri ferðir tosað um, at okkurt útlendskt navn kundi komið at spæla á ólavsøkukonsertini, og hetta hugskot endurtók Kaj Johannesen á tíðindindafundinum í farnu viku.

Men í ár verður tað so ein sera spennandi føroysk skrá, at bólkar sum Føstufressar og Frændur ivaleyst fara at lokka tey meira tilkomnu á konsertina.



*Rói Christiansen er gittarspælari í bólkinum Déjá Vu, sum stóð seg væl í Prixnum og sum hevur verið uttanlands og spælt fyrr í ár.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*









OKKARA STØRSTA ÚTSØLA NAKRANTÍÐ

Útsølan byrjar hósmorgunin 24. juli kl. 10.00
Opið er til kl. 20.00

Fríggjadagin hava vit eisini opið til kl. 20.00,
og leygardagin til kl. 14.00

ØLL ÚTSØLUVØRA FYRI *1/2 PRÍS*

GÓÐA ÓLAVSØKU

KOMIÐ OG GERIÐ KVETTIÐ
Smart vøra heimkomin til ólavsøkuna

VEST MÓTI
Vestmanna • Tel. 42 44 07

KLÆÐNABÚÐIN
Skálavík • 36 11 34